## Fleiri fingið klipp

Aftur nú á hvítusunnu hevur løgreglan koyrt runt á vegunum og ansa eftir ferðsluni. Og heldur ikki hesuferð, komu teir sørir aftur á støðina. Bæði í Eysturoy og í Streymoy hava fleiri bilførarar fingið klipp í koyrikortið. Løgreglan í Havn sigur, at yvirhøvur verða koyrikortini klipt, tí at bilførarar koyra ov skjótt, men inni í Havnini eru tað eisini fleiri bilførarar, sum fáa klipp í kortið, tí at teir ikki sita trygdarbelti ella tí at teir hava børn í bilinum, sum ikki sita í trygdarbelti.



*Savnsmynd*

## Gjørdu um seg í stolnum bili

Heilt tíðliga fríggjamorgunin varð ein bilur stolin uttanfyri Norðurlandahúsið í Havn og hann var milt sagt buglaður saman, tá ið bilførarin fekk hann aftur. Bilurin varð afturfunnin vesturi í Vágum seinni fríggjadagin og tríggir mans eru handtiknir fyri at hava stolið bilin. Edrúvir vóru teir ikki og tað sást bæði á koyrilagnum og á bilinum. Ímeðan teir høvdu bilin, høvdu teir koyrt bæði á vegi og ígjøgnum bø og teir høvdu koyrt á bæði húsaveggir, betonggarðar og gyrðingar. Bilurin var illa farin, men mannskaði var ongin.

# Slapp livandi frá ógvu

**Ekslusivt!**



**Leygarmorgunin fekk føroyski hermaðurin, Valdimar Tjørnudal at sanna, hvussu vandamikið tað er at vera útstasjoneraður í Afghanistan: Ein landmina kundi eins væl gjørt enda á 27 ára gamla lívi hansara. – Men vit vóru sera hepnir. Brast tann triðja løðingin, so komu vit ikki livandi frá hendingini, sigur hann í hesi eksklusivu samrøðuni við Sosialin**

HERMAÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Mynd: Símun Jóanesarson Hansen*

**Afghanistan:** - Sjálvandi er ein í sjokk eftir ein slíkan tilburð. Men veitst tú hvat – vit sótu bara og flentu aftaná!!

Síðani í januar mánaði hevur 27 ára gamli Valdimar Tjørnudal úr Signabø verið partur av donsku herdeildini í Helmand-landslutinum í Afghanistan.

Leygardagin gekk veruleikin upp fyri honum um, hvussu vandamikið eitt slíkt starv í roynd og veru er: At tað snøgt sagt kann kosta einum lívið, hóast ein situr trygt í sterkum bili.

Eitt størri bilafylgi kom henda morgunin koyrandi gjøgnum eitt øki, tá bilurin hjá Valdimar brádliga koyrir á eina landminu, ið var løgd út júst við hesum endamálinum.

Henda var so mikið sterk, at bilurin varð slongdur upp í luftina og øll vinstra síðan í bilinum sprongd burtur. Hetta var sama síðan, sum førarin og Valdimar sótu.

- Eg merkti bara, at okkurt var galið, tá eg brádliga fekk alt dúrkið á bilinum upp undir meg. Tað føldist akkurát sum um onkur stóð og langaði ein hamara upp undir føturnar á mær. Tað vísti seg, at henda minan hevði sprongt alla vinstru síðuna í pettir og alt var tað reina kaos.

- Vit hava fingið at vita, at hesir PMV-bilarnir eru av sterkasta slagi. Og tað fingu vit sjálvir fullgott prógv fyri henda morgunin. Var talan um onkran annan bil, hevði hann helst endað sum ein kroyst sardin-dós!

- Vit hava so í øllum førum fingið eitt skrivligt prógv um, at bilurin er rættiliga tryggur, slær Valdimar fast.

Hann fekk nakað av skaða í báðar føturnar og liggur í løtuni á sjúkrahúsi í Danmark. Í gjárkvøldið hittu vit hann á Ríkissjúkrahúsinum til eitt prát. Lagið var gott, og gleðin um at vera komin frá hendingini við lívinum er sterk.

- Men uppgávan í Afghanistan er ikki liðug. Eg MÁ út aftur at gera hana lidna, so teir næstu hermenninir kunnu halda fram, tá okkara partur av uppgávuni er loystur, sigur Valdimar Tjørnudal við Sosialin.

### Óynsktir

Tað vóru ógvuslig tíðindi, ið fyrst bórust í donskum og seinni í føroyskum fjølmiðlum, um teir tríggjar donsku hermenninar, sum vóru fyri álopi í Helmandlandslutinum.



*Valdimar Tjørnudal er í løtuni til kanningar á Ríkissjúkrahúsinum. – Vit kundu akkurát tað sama verðið dripnir av ógvusligu spreingingini, sigur hann*

Teirra uppgáva sum partur av altjóða ISAF-herdeildini er at tryggja friðin og at byggja landið uppaftur eftir herviligt borgarakríggj. Men tað er júst hetta arbeiðið, sum øll í landinum ikki eru eins fegin um – millum annað teir mongu talibanhermenninir.

Fyri ein vanligan hermann í danska herinum eru teir vitandi um, at teir eru óynsktir í landinum.

Henda minniliga fríggjadagin fekk so Valdimar sjálvur eisini eina ávaring um, at støðan er lítið broytt í so máta, hóast ISAF hevur verið leingi í herjaða landinum.

Í brotpartinum av einum sekundi kundi lív teirra verðið broytt fullkomuliga, og teir kundu í ringasta føri komið heim aftur til síni kæru í kistum.